**Strategiska leiðslan**

Leiðslan á einari fyritøku má arbeiða við teimum strategisku málunum, sum fyritøkan hevur sett sær fyri. Men hvussu fær leiðarin sína yvirskipaðu vitan setta í verk, soleiðis at fakliga starvsøkið hjá honum sjálvum mennist? Og hvussu verða strategisku málini nádd?

Hetta er ein høvuðstáttur í lærugreinini "strategisk leiðsla". Røtt leiðsla í einari strategiskari tilgongd fær bæði leiðarar og starvsfelagar í sín part, soleiðis at tey øll taka ábyrgd, og øll fáa øktan virkishug í strategiska arbeiðnum hjá fyritøkuni.

**Innihald**

• Strategisk ástøði og fyrimyndir

• Strategisk greining, menning og íverksetan

• Menning av leiðslutilgongdum, sum seta strategiina í verk.

• Broytingartilgongdir og broytingarleiðsla

Lærugreinin telur 10 ECTS og endar við, at tann lesandi skrivar sína egnu longu verkætlan, og so verður ein munnlig próvtøka hildin.

Lærugreinin er ein av teimum kravdu lærugreinunum á leiðslubreytini.